Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Løgtingið

Dagfesting: 05.03.2021
Mál nr.: 21/01190
Málsviðgjørt: GÁ
Eftirkannað: Lógartænastan 14.02.2021

Uppskot til

Løgtingslóg
um
at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið

§ 1. Landsstýrismanninum verður heimilað at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið.
Stk. 2. Útreiðslurnar til byggingina kunnu í mesta lagi vera 26,3 mió. kr.

§ 2. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2024.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í 2002 varð avgerð tikin um, at Skipaeftirlitið skuldi staðsetast í Vágum. Høli vórðu funnin, og útleigari innrættaði hølini til endamálið. Talan var um ein smiðjubygning, sum varð innrættaður til skrivstovur.

Í mai 2016 mátti Sjóvinnustýrið flyta úr hølunum. Hølini vóru ikki longur mett egnað til virksemið hjá Sjóvinnustýrinum.

Samskift varð um at gera ábøtur og umvælingar av bygninginum, men hesar ætlanir bóru ikki á mál. Ætlanin varð tí slept, og leigumálið varð sagt upp í september 2016.

Sjóvinnustýrið kannaði, hvørjir møguleikar vóru fyri at flyta í onnur hóskandi høli í Vágum. Kanningin staðfesti, at eingi høli eru tøk, sum hóska til virksemið hjá stovninum. Serliga er tað støddin, sum avmarkar møguleikarnar.

Ein roynd varð gjørd at seta leigumálið í útboð. Tvey tilboð komu inn og var leigukostnaðurin somikið høgur, at mett varð, út frá einum búskaparligum sjónarmiði, at skilabest var, at landið letur byggja nýggj høli til Sjóvinnustýrið.

1.2. Galdandi lóggáva

Sjóvinnustýrið húsast í leigaðum hølum í Havn sum ein fyribilsloysn, til nýggjur umsitingarbygningur er bygdur.

Í løgtingslóg nr. 37 frá 30. apríl 2018 um at byggja umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið varð materiell heimild latin landsstýrismanninum at halda byggiútreiðslur í sambandi við bygging av nýggjum umsitingarbygningi til Sjóvinnustýrið upp á 13,7 mió. kr. Tað sæst í viðmerkingunum til uppskotið til lógina, løgtingsmál nr. 54/2017, at tað skuldi byggjast ein umsitingarbygningur upp á slakar 900 fermetrar. Bygningurin skuldi eftir lógini verða staðsettur í Vágum.

Sjóvinnustýrið gjørdi í samstarvi við føroyska verkfrøðingafyritøku eina tørvslýsing fyri stovnin. Landsverk gjørdi út frá tørvslýsingini eina meting av kostnaðinum av byggingini og kom fram til, at ein bygningur, við støði í tørvinum hjá Sjóvinnustýrinum, fór at kosta á leið 13,7-15,9 mió. kr. Innbúgv varð ikki íroknað.

Tað sæst eisini í viðmerkingunum til uppskotið til lógina, at í 2018 skuldi farast undir at gera byggiskrá, bjóða út og byrja byggingina. Mett varð, at tað tekur 12 mánaðir frá útboði, til bygningurin er klárur at flyta inn í. Eftir ætlanini skuldi flytast inn í nýggju hølini á heysti 2019. Fyri at leggja upp fyri møguligum seinkingum, varð úrgildissetanin sett til 31. desember 2020.

Í 2018 varð avgjørt fyribils at bíða við verkætlanini orsakað av nógva byggivirkseminum í landinum og trýstinum, sum hetta legði á byggimarknaðin og føroyska búskapin.

Lógin fór úr gildi 31. desember 2020.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at fáa til vega nýggja materiella lógarheimild samsvarandi játtanarskipan landsins til at halda útreiðslur til at byggja ein umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið og harvið fáa hølisviðurskiftini hjá Sjóvinnustýrinum í fastar karmar.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum fær landsstýrismaðurin nýggja materiella heimild at halda byggiútreiðslur í sambandi við bygging av nýggjum umsitingarbygningi til Sjóvinnustýrið upp í 26,3 mió. kr. Viðmerkjast skal, at talan er um eina meting av kostnaðinum, sum Landsverk hevur gjørt.

Verkætlanin er í løtuni í útboð sum heildarenterprisa, t.e. at tann, sum vinnur útboðið, teknar, projekterar og byggir. Útboðið endar seint í mars mánaði, og tá ið Landsverk hevur gingið tilboðini ígjøgnum, verður endaligur kostnaður latin Løgtinginum.

Um fíggjarliga játtan verður víst til brot *2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur*.

Við uppskotinum fær Sjóvinnustýrið eina framtíðartryggjaða loysn og støðugar karmar um virksemið hjá stovninum. Ætlanin er at byggja ein bygning upp á slakar 800 fermetrar. Bygningurin verður bygdur á matr. nr. 319a í Vága kommunu. Grundøkið er 1.480 fermetrar til støddar.

Landsverk hevur í samstarvi við Sjóvinnustýrið gjørt byggiskrá og hevur sett heildarenterprisuna í alment útboð. Landsverk fer at hava verkætlanarleiðsluna um hendi.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til hoyringar hjá Fíggjarmálaráðnum og Vága kommunu.

Hoyringarsvarini eru løgd við sum fylgiskjøl til lógaruppskotið.

Vísandi til hoyringarsvarið frá Fíggjarmálaráðnum um, at verkætlanir skulu vera prosjekteraðar í minsta lagi fram til verkætlanaruppskot, áðrenn verklagslóg verður løgd fyri Løgtingið, er at siga, at hetta sum meginregla er skilagott. Landsstýrið er tó samt um, at tað í hesum førinum er skilabetri at leggja uppskotið fyri Løgtingið innan evstu framløgufreist fyri síðani at tillaga uppskotið, tá ið tilboðini eru komin inn seinast í mars, sí í hesum sambandi 1.4. frammanfyri um endaligan kostnað av verkætlanini.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Landsverk hevur gjørt eina meting av kostnaðinum av bygninginum og hevur eftir bestu sannføring mett, at umsitingarbygningurin til Sjóvinnustýrið fer at kosta á leið 26,3 mió. kr. Innbúgv er ikki íroknað.

Fíggjarligu avleiðingarnar verða endaliga kendar, tá útboðið er av, og útboðsvinnarin er funnin.

Stovnurin metir seg í stóran mun kunna endurnýta tað innbúgv, sum stovnurin hevur í dag, og metir, at tað, sum møguliga skal keypast afturat, kann haldast innanfyri rakstrarjáttanina hjá stovninum.

Útreiðslurnar verða fíggjaðar á løgtingsfíggjarlógini fyri 2020, 2021 og 2022. Á fíggjarlógini 2020 vórðu 5.300 tús. kr. játtaðar til endamálið, av hesum eru góðar 160 tús. kr. brúktar til at fyrireika útboðið. Restupphæddin verður støðlað. Á fíggjarlógini 2021 eru 9.000 tús. kr. settar av til endamálið. Í ætlanini fyri 2022 eru 12.000 tús. kr. til endamálið.

Mett verður ikki, at nýggi bygningurin fer at hava øktan rakstur við sær í mun til verandi støðu, har stovnurin húsast í leigaðum hølum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Uppskotið verður ikki mett at hava umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur. Tað fer at hava smávegis umsitingarligar avleiðingar fyri Sjóvinnustýrið, tí at stovnurin frameftir sjálvur skal varða av umsitingarhølunum og økinum uttanum. Mett verður ikki, at tørvur er á øktari játtan til hetta.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur við sær økt virksemi fyri byggivinnuna.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið. Í útboðnum er dentur lagdur á grøna orkuloysn og burðardyggan rakstur.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Eingir millumtjóðasáttmálar eru á økinum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki í ósamsvari við Hoyvíkssáttmálan og Evropeiska mannarættindasáttmálan. Nýggi bygningurin fer at lúka krøvini í galdandi byggilóg v.m., undir hesum atkomu fyri persónar, ið bera brek, t.d. rørslutarn.

2.9. Markaforðingar
Uppskotið hevur ikki við sær markaforðingar.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið heimilar landsstýrismanninum at nýta upp í 26,3 mió. kr. til at byggja ein umsitingarbygning til Sjóvinnustýrið.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?

Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Eftir uppskotinum verður heimilað landsstýrismanninum at gera neyðugar avtalur um bygging av umsitingarbygningi til Sjóvinnustýrið innan fyri ta hámarksupphædd, sum ásett er í uppskotinum.

Hetta er ein materiell heimild, og av tí at ætlanin hevur við sær byggiútreiðslur fleiri fylgjandi fíggjarár, er neyðugt at útvega játtan fyri hvørt ár sær til útreiðslurnar í árinum.

Til § 2
Áseting um gildiskomu. Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 1. januar 2024.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 5. mars 2021

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Hoyringarsvar frá Fíggjarmálaráðnum
Fylgiskjal 2: Hoyringarsvar frá Vága kommunu
Fylgiskjal 3: Byggiskrá í sambandi við útboðið (dagførd 24.02.2021)